## Lava og Løkin skulu royna seg

Leygardagin fáa teir báðir nýggju føroyingarnir í Frem, Andreas Lava Olsen og Bogi Løkin, høvi at royna seg í venjingardysti fyri nýggja felagið, Frem. Hetta sleppa teir saman við Jónas Þór Næs, sum eisini er knýttur at felagnum. Venjingardysturin verður spældur leygardagin, har mótstøðuliðið er Nordvest FC. Á heimasíðuni hjá Frem skriva tey, at spennandi verður at síggja, hvussu tað fer at gangast nýggju leikarunum. Somuleiðis stendur skrivað, at dysturin verður spældur á graslíki og tað skuldi einans verið ein fyrimunur fyri føroyingarnar. Dysturin byrjar klokkan 10.30, føroyska tíð, og spælt verður á Holbæk Stadion.



# Dýrastu 46 sekundini...

**Íslendingar rendu seg aftur í gjárkvøldið í ein javnleik í evstu løtu, tá Eysturríki skoraði trý mál í 46 sekund. Danmark vann á Serbia og er longu komið víðari**



Heri Simonsen

Danmark vísti sera gott spæl ímóti Serbia í gjárkvøldið, tá teir vunnu 28-23 á Serbia í EM-bólki B. Støðan í hálvleikinum var 15-9 til Danmark. Danmark vinnur seg sostatt víðari til millumspælið, og fær minst tvey stig í millumspælinum.

Allar 60 minuttirnar vóru danskarar betri, men ímóti dystarenda sleptu teir takinum nakað, so Serbia slapp at pynta nakað um úrslitið. Men størsta partin av dystinum vísti Danmark spæl, sum gevur vónir um, at teir kunnu røkka einari hálvfinalu.

### Eggert bestur

Anders Eggert var valdur til vinstra vong fram um garvaði veteranin, Lars Christiansen, og Anders Eggert takkaði fyri álitið við at skjóta heili 10 mál. Vongurin hjá Flensburg var sera frekur í sínum offensiva spæli, og setti hann nøkur vøkur mál inn, bæði við lobbum og skrúvubóltum.

Serbia royndi seg við trimum ymiskum málverjum, fyri at royna at byrja fyri, men líka lítið hjálpti hjá teimum, Danmark var væl og virðiliga omaná.



Vónbrotið lýsti úr eygunum á íslendsku spælarunum, eftir at teir upp á 46 síðstu sekundini ímóti Eysturríki høvdu sløsað trý mál og sigurin burtur

### Ísland snávaði

Enn eina ferð mistu íslendingar á stokkinum, tá teir ímóti eysturríksku vertunum mistu eina leiðslu, sum í løtum var fimm mál. Tá bara 46 sekund vóru eftir, var Ísland á odda 37-34, men Eysturríki fekk trý mál á rað hesa lítlu løtuna, og so hevði Ísland enn eina ferð søplað sigurin burtur – akkurát sum í fyrsta dystinum ímóti Serbia.

Danmark og Ísland spæla leygarkvøldið klokkan 19.15, og liggur trýstið veruliga á Íslandi áðrenn dystin. Liðini spæla ofta javnt, og sjáldan er meir enn eitt mál á muni, men hesa ferð er íslendska kravið ein sigur.

# Noreg vann lagnudystin

**Kristian Kjelling vísti stórspæl ímóti Russlandi, og tað var í tøkum tíma hjá norðmonnum**

Noreg vann ein sera týðandi 28-24 sigur á Russlandi í EM-bólki A, eftir at Noreg var á odda 16-13 í steðginum.

Kristian Kjelling hevur ikki spælt væl á norska hondbóltslandsliðnum seinastu tíðina, men kortini trúði landsliðsvenjarin, Robert Hedin uppá, at Kristian Kjelling fór at sláa til ímóti Russlandi. Tíbetur fyri Noreg, so sá Robert Hedin rætt, tí Kristian Kjelling setti átta mál inn ímóti Russlandi, og átti hann síni stóru fingramerki í norska sigrinum í gjárkvøldið.

– Tað var stuttligt at verða við til hendan dystin. Vit upplivdu nakað av trýsti áðrenn dystin, og tí var tað eyka gott at vinna upp á hendan mátan, segði Kristian Kjelling við VG, aftaná dystin.

Ímóti Kroatia fekk hann bara tvey mál í 10 skotroyndum, men hann tordi at royna at skjóta nógv ímóti Russlandi, og tað bar munandi betri til, tí hesa ferð fekk hann átta av 16 skotroyndum í netið.



Kristian Kjelling, sum brendi nógv í fyrsta dystinum, tók annað skinn um bak, tá Noreg í gjárkvøldið vann á Russlandi

### Hava enn kjansin

Kroatia vann 28-25 á Ukraina, sum verður mótstøðuliðið hjá Noregi í annaðkvøld klokkan 19.10. Megnar Noreg at vinna tann dystin, vinnur liðið seg í millumspælið og fær tvey stig við sær.

Ukraina hevur ikki gjørt tær stóru skreytirnar enn, og eru norðmenn árvaknir, so skuldi ligið væl fyri at fingið enn ein sigur í hús. **HS**

**EM-kappingin 2010**

| | | |
|---|---|---|
| **Bólkur A** | | |
| 19/01 | **Russland-Ukraina** | **37-33** |
| 19/01 | **Kroatia-Noreg** | **25-23** |
| 21/01 | **Ukraina-Kroatia** | **25-28** |
| 21/01 | **Noreg-Russland** | **28-24** |
| 23/01 | Kroatia-Russland | 17.10 |
| 23/01 | Noreg-Ukraina | 19.10 |
| **Bólkur B** | | |
| 19/01 | **Danmark-Eysturríki** | **33-29** |
| 19/01 | **Ísland-Serbia** | **29-29** |
| 21/01 | **Eysturríki-Ísland** | **37-37** |
| 21/01 | **Serbia-Danmark** | **23-28** |
| 23/01 | Eysturríki-Serbia | 17.00 |
| 23/01 | Danmark-Ísland | 19.15 |
| **Bólkur C** | | |
| 19/01 | **Týskland-Pólland** | **25-27** |
| 19/01 | **Svøríki-Slovenia** | **25-27** |
| 20/01 | **Slovenia-Týskland** | **34-34** |
| 20/01 | **Pólland-Svøríki** | **27-24** |
| 22/01 | Týskland-Svøríki | 17.15 |
| 22/01 | Pólland-Slovenia | 19.15 |
| **Bólkur D** | | |
| 19/01 | **Spania-Kekkia** | **37-25** |
| 19/01 | **Frakland-Ungarn** | **29-29** |
| 20/01 | **Kekkia-Frakland** | **20-21** |
| 20/01 | **Ungarn-Spania** | **25-34** |
| 22/01 | Frakland-Spania | 17.15 |
| 22/01 | Ungarn-Kekkia | 19.15 |

**EM-endaspælið**

**Bólkur 1**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kroatia | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 53 | 48 | 5 | 4 |
| 2 Noreg | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 51 | 49 | 2 | 2 |
| 3 Russland | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 61 | 61 | 0 | 2 |
| 4 Ukraina | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 58 | 65 | -7 | 0 |

**Bólkur 2**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Danmark | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 61 | 52 | 9 | 4 |
| 2 Ísland | 3 | 0 | - | 3 | - | 0 | 66 | 66 | 0 | 3 |
| 3 Eysturríki | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 66 | 70 | -4 | 1 |
| 4 Serbia | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 52 | 57 | -5 | 1 |

**Bólkur 3**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Pólland | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 54 | 49 | 5 | 4 |
| 2 Slovenia | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 61 | 59 | 2 | 3 |
| 3 Týskland | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 59 | 61 | -2 | 1 |
| 4 Svøríki | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 49 | 54 | -5 | 0 |

**Bólkur 4**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Spania | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 71 | 50 | 21 | 4 |
| 2 Frakland | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 50 | 49 | 1 | 3 |
| 3 Ungarn | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 54 | 63 | -9 | 1 |
| 4 Kekkia | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 45 | 58 | -13 | 0 |